## Føroyingar við í 15 verk-ætlanum

**Norðurlendska Atlantssamstarvið hevur játtað stuðul til fleiri verkætlanir í Norðuratlantshavi**

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Felagsskapurin, NORA, sum er ein felagsskapur fyri norðurlendskt atlantssamstarv, hevur á fundi í Nuuk, játtað at lata stuðul til fleiri vinnuligar verkætlanir, har tey norðurlond, sum hava mark til Atlantshavið, samstarva.

Talan er um Norður- og VesturNoreg, Føroyar, Ísland og Grønland,

À fundinum viðgjørdi NORA, vórðu yvir 40 umsóknir um stuðul viðgjørdar og tilsamans hevur felagsskapurin játtað stuðul til 20 verkætlanir har samstarv er ímillum hesi fýralondini. Tilsamamans vórðu 3.720.000 krónur veittar í stuðuli.

Føroyingar eru við í 11 av hesum verkætlanum, men hava so ein leiklut í fýra verkætlanum afturat

Talan er, m.a. um at gera úrdráttir úr tara, um ráðstevnu um toskaaling, um tøkni í alivinnuni, um ferðavinnu, vistfrøðiliga aling botøkni, um vatnorku og so er eisini ætlanin at kanna møguleikarnar fyri fastari ferðafólkasigling ímillum Útnorður og Norðuramerika

Annars er grønlendingurin, Kenneth Høegh valdur til formann komandi árið.

# Føroyska og danska tingið heysta frá hvørjum øðrum

**Formansskapurin hjá Fólkatinginum hevur verið í Føroyum um vikuskiftið og hitt formansskapin í løgtinginum**

SAMSKIFTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Christian Mejdahl er formaður í fólkatinginum og hann er við á Føroyavitjanini hjá formansskapinum hjá fólkatinginum*

Um vikuskiftið hevur formanskapurin hjá danska fólkatinginum verið í Føroyum og hitt formanskapin í løgtinginum.

Formansskapirnir í fólkatinginum og í løgtinginum hittast einaferð um árið, annahvørt ár í Føroyum og annaðhvørt ár í danmark.

Hetta er eitt samstarv hevur verið í nøkur ár.

Endamálið við hesum samstarvinum er at heinta royndir frá hvørjum øðrum, sigur Hergeir Nielsen, sum er 1. næstformaður í Føroya Løgtingi.

Og nú formansskapurin í danska fólkatinginum er í Føroyum, er fundurin við formanskapin í løgtinginum lagdir í Suðuroy og í allan gjáramorgurin var sostatt fundur á hotellinum í Øravík.

Hergeir Nielsen sigur á hesum fundunum verður tosað um felags áhugamál í sambandi við arbeiðið í fólkatinginum og í løgtinginum.

– Vit kunnu læra av hvørjum øðrum, tí vit fáa at vita, hvussu fólkatingið arbeiðir og teir fáa at vita, hvussu Føroya Løgting arbeiðir.

– Endamálið við hesum samstarvinum støðugt at menna løgtingsis arbeiðið

Hann sigur, at tvey ítøkilig mál, sum fara at verða umrøtt á fundinum, eru tað, sum fór fram tá ið yvirtøkulógirnar og uttanríkispolitisku heimildarlógirnar fingu viðgerð á Føroya Løgtingi.

– Í tí sambandi vóru harðar atfinningar frá andstøðuni í Løgtinginum um, at málini høvdu ikki fingið nóg dygga viðgerð og ikki vórðu nóg væl lýst. Eitt, sum andstøðan serliga fýltust á, var, at hon ikki slapp at kalla inn serfrøðingar, sum hon helt, kundi lýsa málið.

Hergeir Nielsen sigur, at ætlanin er at spyrja donsku gestirnar, sum slíkt eisini kundi hent í fólkatinginum.

Annars heldur hann, at Føroya Løgting átti at havt slíkt samstarv við fleiri av okkara grannalondum í Norðurhøvum.

# Sera góður fundur um røktarheim og kommunusamanlegging í Suðuroy


*– Eg haldi at vit høvdeu ein sera góðan fund,sigur Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porkeri*

**Kommunurnar í Suðuroy fara nú at arbeiða víðari við spurninginum um at byggja røktarheim í Suðuroy og tær hava eisini sett hol á arbeiðið at leggja kommunur í oynni saman**

RØKTARHEIM OG KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Allir bý- og bygdaráðslimir í Suðuroy hava havt fund um ætlanina at byggja røktarheim í Vági og um kommunusamanlegging.

– Vit høvdu ein sera góðan fund, sigur Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porkeri, sum var tann, ið kallaði saman til fundin.

Við á fundinum vóru umboð fyri almanna- og heilsumálaráðið, umboð fyri fíggjarmálaraðið, sum kunnaðu frá um røktarheim og um fíggingarmøguleikar. Men so var Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Sunda kommunu eisini við á fundinum, har hann greiddi frá teirra røktarheimsbygging og frá teimum royndum, tey høvdu gjørt sær av kommunusamanleggingini í Sundalagnum.

Úrslitið av fundinum var at Kirstin Strøm Bech skal kalla borgarstjórarnar í oynni saman til at viðgera málið víðari.

Tað liggur í kortunum, at ætlaða røktarheimið skal byggjast í Vági og tí var hildið at vera natúrligt at tað er borgarstjórin í Vági, sum stendur fyri arbeiðnum.

Eli Frederiksen sigur, at áhugi var heilt avgjørt fyri at arbeiða víðari við ætlanini at byggja røktarheim í Vági.

Men hann sigur eisini, at nú er hol sett á arbeiðið at leggja kommunur í oynni saman.

– Vit eru sinnað at kanna fyrimunir og vansar við eini kommunusamanlegging so at borgarin hevur eitt betri støðið at meta um støðuna, skuldi tað komið hartil, sigur borgarstjórin í Porkeri.